Danir fleiri vindmyllur

Danir hava gjørt av at fara undir heimsins størstu vindmylluverkætlan, sum verður á Horns Rev úti fyri vesturjútsku strondini. Myllurnar skulu framleiða 200 MW, og verkætlanin er mett at kosta einar tvær milliardir krónur.

Orkustýrið hevði boðið fleiri feløgum at seta vindmyllurnar upp, men tá freistin var úti mikudagin, høvdu bara fýra feløg gjørt vart við seg. Nú fer stýrið so at kanna, um feløgini eru før fyri at fara undir uppgávuna, og tá tað arbeiðið er liðugt, verða feløgini biðin um at geva eitt boð upp á arbeiðið. Tann endaliga avgerðin verður ætlandi tikin fyri jól.

Vindmylluverkætlanin við Horns Rev verður 25 prosent størri enn tær báðar størstu, sum eru í rakstri. Ætlanin er at nýta stórar vindmyllur, sum kunnu framleiða 5 MW hvør, og tí skulu einar 40 myllur setast upp. Tær skulu so byrja at veita streym í 2007 ella í 2008.

Onga fosturtøku á sjónum

Myndugleikarnir í Portugal hótta nú við at brúka makt ímóti einum niðurlendskum skipi, sum er komið til Portugals at bjóða kvinnum har fosturtøku.

Portugal er einasta landið í ES, sum hevur forboð ímóti fosturtøku, og tað hevur fingið ein niðurlendskan kvinnufelagsskap at senda skipið »Aurora« til Portugals at bjóða kvinnum fosturtøku umborð. Tað kann ikki gerast, meðan skipið liggur í havn, og tí siglir skipið út í altjóða sjógv, har fosturtøkurnar so verða framdar. Men teir portugisisku myndugleikarnir vilja ikki hoyra talan um tað niðurlendska tilboðið, og teir hava tí sett skipinum forboð fyri at koma í havn. Skipið liggur tí tólv fjórðingar úr landi, og tvey skip hjá portugisisku sjóverjuni halda eygað við tí.

Í Portugal hava kvinnufelagsskapir roynt at fáa politikararnar at loyva fosturtøku, men higartil til fánýtis. Herfyri víst ein meiningakanning, at tær flestu kvinnurnar í Portugal vilja hava politikararnar at broyta ta strongu lógina.

Tók milliardir frá egnum felag

Conrad Black, sum fyrr átti bretsku Telegraph-blaðfyritøkuna, er nú skuldsettur fyri at hava tikið 2,5 milliardir krónur frá fyritøkuni.

Grannskoðarar, sum hava kannað fíggjarviðurskiftini hjá fyritøkuni og Conrad Black, eru komnir eftir, at fyrrverandi eigarin brúkti nógvar pengar hjá fyritøkuni til egin áhugamál, og at hann var ikki smátøkin. Eitt nú rindaði rindaði fyritøkan 600.000 krónur, sum tað kostaði at umvæla Rolls Royce-bilin hjá eigaranum. Tá hann fleyg tvørtur um Atlantshavið, fleyg hann altíð við Concorde-flogførunum, har ferðaseðilin kostaði meiri enn 50.000 krónur, sum blaðfyritøkan rindaði. Føðingardagurin hjá konuni kostaði 300.000 krónur, sum fyritøkan eisini rindaði. Í einum øðrum føri fekk konan átta milliónir krónur. Í roknskapinum stóð, at tað var fyri eina teldu, pennar, blýantar og annað.

Grannskoðararnir siga í frágreiðingini, at Conrad Black gjørdi ikki mun á sínum egnu pengum og pengunum hjá Telegraph-fyritøkuni.

Ákærd fyri gamalt morð

Amerikonsku myndugleikarnir hava ákært eina kvinnu og ein fyrrverandi sambúgva hennara fyri eitt 35 ára gamalt morð.

Málið hevur sín uppruna í 1969, tá tann trý ára gamla gentan Michelle Pulsifer brádliga hvarv. Eingin visti, hvat var vorðið av henni, men nú hevur løgreglan funnið líkið av gentuni í Silverado Canyon uttan fyri Los Angeles. Sambært løgregluni var tað mamman, sum myrdi gentuna, og at sambúgvi hennara jarðaði tað í Silverado Canyon.

Bróður gentuna, tann nú 41 ára gamli Richard Pulsifer, hevur greitt løgregluni frá, at systirin hevði fjalt seg undir einari dýnu, tí hon ræddist mammuna, men at mamman kortini fann hana. Tá tey stutt eftir fóru í bilin, var Michelle ikki við. Mamman hevði tá sagt honum, at tað var ikki pláss fyri systrini í bilinum.

UTTAN ÚR HEIMI

Tað endaleysa og náðileysa kríggið

Tær hava sitið uttan fyri skúlan í Beslan og bíðað og biðja eftir at sleppa undan blóðbaði. Í gjár váttaðu myndugleikarnir, at teir 17 gíslarænararnir hava meiri enn 320 gíslar í skúlanum, teirra millum 132 børn

Vladimir Putin lovaði at gera enda á krígnum í Kekenia, men gíslatøkan í Beslan vísir, at enn er langt á mál

GÍSLATØKA

Árni Joensen:
fartekst@mail.dk

Tá Vladimir Putin tók við sum russiskur forseti, lovaði hann, at hann skuldi fá enda á krígnum í Kekenia innan fýra mánaðir. Nú fimm ár seinni er eingin loysn í eygsjón. Stríðið er at kalla tað sama sum tá. Tann einasti munurin er, at fleiri fólk hava latið lív síðani.

At stríðið fór at harðna nú kemur ikki óvart á russar. Tíðliga í summar segði tann hóvligi kekenski loysingarmaðurin Aslan Maskhadov, at loysingarmenninir fóru at herða bardagan, og teir hava eisini víst, at teir eru førir fyri at gera vart við seg. Í juni vórðu russar tiknir fullkomiliga á bóli, tá loysingarmenninir skipaðu fyri fleiri samskipaðum atsóknum í grannalýðveldinum Ingusjetia. Næstan 100 fólk lógu eftirá, og fyri hálvari aðru viku síðani doyðu umleið 120 fólk, tá loysingarmenninir lupu á fleiri mál í kekenska høvuðsstaðnum Groznyj.

Maskhadov hevur sagt, at hann og hansara menn hava einki við gíslatøkuna í Beslan at gera, og hann fordømdi álopið á skúlan. Men eygleiðarar siga, at loysingarrørslan gongur í bólkum, og at Maskhadov hevur ikki ræðið á øllum bólkunum. Harafturat halda eygleiðararnir, at tað unga ættarliðið í Kekenia, sum er uppvaksið við kríggi, er munandi meiri víðgongt og aftrar seg ikki við at nýta skúlabørn fyri at røkka sínum málum.

Vilja hava russar burtur

Men hvat er so málið hjá teimum kekensku uppreistramonnunum? Hjá teimum flestu er málið at fáa enda á tí russiska áganginum í Kekenia, tí í veruleikanum er tað bara ein minniluti av kekenska fólkinum, sum vil hava eitt sjálvsstøðugt islamskt ríki. Nógvir kekenar vóna samstundis, at russar fara at taka seg aftur av teirri einføldu orsøk, at kríggið er ov dýrt fyri russiska ríkiskassan, tí landið hevur brúk fyri pengunum til onnur endamál.

Fleiri eygleiðarar í Moskva halda, at Putin er longu komin til hesa niðurstøðuna. Hann hevur júst skipað fyri forsetavali í Kekenia, og ætlan hansara sigst vera at lata kekenar sjálvar greiða innanhýsis viðurskiftini. So kann Russland taka hermenn sínar heimaftur stig fyri stig, og so kann Putin sita í Moskva og halda eygað við tí, sum fyriferst í Kaukasus-fjøllunum, siga eygleiðararnir.

Men gíslatøkan í skúlanum í Beslan kann forða hesari ætlanini. Tað veldst um, hvussu hon endar.



Do^spqbfk^o
KĠdboÜ ld
r j s Í ifkd^o
BASALT
G@ Ps^_lÜpdÐq^ 3-
qbi /..33.* /..33/*0/.330
_^p^iq=mlpq lifs^kq cl

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

Gluggaglæma

Føroysk handverkslist

Søluframsýning í Müllers pakkhúsi

Livandi verkstaðir

4.–12. sept. 2004

Opið er:
Gerandisdagar kl. 10.00 – 20.00
Sunnudagar kl. 14.00 – 20.00
Mikudagin 8. sept. stongt!

Atgongd: vaksin 50 kr. / børn 20 kr.

Mótasýningar · Ballett · Tónleikur · Kafé

www.craft.fo
Føroya Heimavirkisfelag

Tvingsilssøla

Fríggjadagin 24. september 2004, kl. 10.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 328, Fuglafirði.**

Ognin er eitt grundøki til støddar 561 m^2 við ástandandi sethúsum. Húsini eru í tveimum hæddum:
Kjallari 91 m^2, 30 m^2 innrættað.
Miðhædd er 103 m^2, 91 m^2 innrættað.
Húsini eru úr betong, kløddd við viði. Girðing er um stykkið.

Sølan er umbiðin av **Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, 100 Tórshavn, tel. 311145, (sak nr. 20040417),** sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Føroya Fútarættur

Hans Jacob Højgaard 100

Í sambandi við at 100 ár eru liðin síðani Hans Jacob Højgaard sáli varð borin í heim, letur framsýningin um tónaskaldið og kórleiðaran upp í kjallaranum í Fríðrikskirkjuni á Toftum leygarkvøldið 4. september kl. 19.

Kl. 20 fer Ólavur Hátún at hugleiða um kórleiðaran og tónaskaldið.

Framsýningin verður eisini opin týskvøldini 7., 14. og 21. september frá kl. 19 til 21.

Skúlaflokkar og aðrir bólkar, ið hava áhuga at síggja framsýningina aðrar tíðir, eru vælkomnir at seta seg í samband við kunningarstovurnar í Eysturoynni.

Fyrireikingarbólkurin

Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

Grundleggjandi leiðaraútbúgving
96 tímar, 12 dagar í 6 mðr., kl. 09.00-16.00, byrjar 4. okt. 2004

Innihald
- verð meira tilvitað/ur um leiðslu
- lær tey grundleggjandi leiðsluamboð
- rættur leiðarastílur og leiðsluháttir í ymiskum umstøðum?
- hvussu megni eg at handfara samskifti og trupulleikar?
- persónlig ráðlegging fá skil á egnari tíð

Tilmelding: áðrenn 21. sept. 2004, kostnaður: 14.200,00 kr.

Projektleiðaraútbúgving
48 tímar, 6 dagar í 3 mðr. kl. 09.00-16.00, byrjar 29. sept. 2004

Innihald
- hvat er góð projektleiðsla? projektleiðaraleikluturin frá byrjan til enda
- hvussu velji eg rætta leistin? Amboð hjá einum projektleiðara
- gerð av projektætlan við virksemisyvirliti, tilfeingisyvirliti og tíðarætlan
- fellur í teimum ymisku projektstigunum, hvussu sleppur tú undan?
- hvussu tú samansetir, mennir, motiverar ein projektbólk

Tilmelding: áðrenn 16. sept. 2004, kostnaður: 8.200,00 kr.

Starvsfólkasamrøður og hin torføra samrøðan
28., 29., 30 sept., kl. 09.00-16.00

Innihald
- Hvat er starvsfólkamenningarsamrøðan?
  - o Persónlig og faklig førleikaavdúking av starvsfólkunum
- Hví brúka starvsfólkamenningarsamrøður?
  - o Skipað innsavnan av vitan um førleikar uppgradering av starvsfólkunum
- Hvussu verður ein starvsfólkamenningarsamrøða framd?
  - o "Fakligi búnin" hjá leiðaranum (tað formliga)
  - o "Persónligi búnin" hjá leiðaranum (tað óformliga)
- Torføra samrøðan
  - o Venjing í ymiskum samrøðu umstøðum
  - o Virkin lurting og spurnarteknikkir
  - o Sannroyndir mótvegis kenslur
  - o Fellur í samrøðuni

Tilmelding: áðrenn 16. sept. 2004.

Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo,
www.skeiðdsdepilin.fo

team85 358000

Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

Skeið í sept./okt. - nøkur pláss eftir!

Skeið	Dagar, tíð	Kostnaður
Føroyskt, mállæra, rættskr.	15 t., byrjar 14/9	2500
Føroyskt fyri útlendingar	36 t., byrjar 16/9	4700
Business English	24 t., byrjar 18/10	3300
Innleiðsla í roknskap, skatt, mvg	8 t., byrjar 13/9	1750
Word-gr.	16 t., byrjar 9/9	2320
Excel-gr.	16 t., byrjar 23/9	2320
Access-gr.	16 t., byrjar 8/10	2320

Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813

Tilmelding skjótast!

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo,
www.skeiðdsdepilin.fo